# ni á Eystanstevnu í ár



tikin sunnudagin. Framsýningarnar halda fram, matstovurnar hava opið, barnabilarnir koyra, eins og tivoli er allar stevnudagarnar.

Klokkan 15 sunnudagin verður kappróður, og eftir kappróðurin handar borgarstjórin, Rodmundur Nielsen, steypini.

Klokkan 17 sunnudagin syngur Magni Christiansen á stevnuøkinum.

Sumoglíming, togtogan og stafett, har kendir persónar í Runavíkar kommunu eru við, verður á stevnuøkinum sunnudagin klokkan 19.

Skráin sunnudagin endar við kvøldsetu við tónleiki, sangi og skemti í Ítróttarhøllini. Hetta tiltak byrjar klokkan 21.

Seinasta tiltak á skránni fyri Eystanstevnuna í ár er Eystanstevnukabarettin, sum hevur seinastu sýning í Glyvra skúla mánakvøldið klokkan 20.

# róð verður kortini



*Róð verður fult mál á Eystanstevnu; 1.000, 1.500 og 2.000 metrar. - Hetta letur seg gera, tí umstøðurnar á Skálafjørðinum eru serstakliga góðar, sigur Kappróðrarfelagið hjá NSÍ. Aftanfyri sæst Róðrarneystið á Glyvrum, har róðrarfólk og onnur, sum ynskja at leiga hølini, hava fingið betri umstøður*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

verður.

– Róð verður fult mál; 1.000, 1.500 og 2.000 metrar. Hetta letur seg gera, tí umstøðurnar á Skálafjørðinum eru serstakliga góðar, sigur kappróðrarfelagið.

## Fimm bátar

Kappróðrarfelagið NSÍ hevur í ár fimm manningar við í FM-róðrinum; 5-mannafarið Tjaldrið við gentum og dreingjum, 6-mannafarið Sølmund við kvinnum og monnum og 10-mannafarið Eysturoying, sum endaði á øðrum plássi á ársins fyrstu summarstevnu, Norðoyastevnu.

– Manningarnar hava longu vant í fleiri mánaðir. Byrjað varð at venja innandura, og síðan varð farið í bátarnar í apríl mánaða. Vit eru spent eftir at síggja, hvørji úrslitini verða í summar, siga tey í kappróðrarfelagnum.

## Nýggj venjingarhøli

Venjingarumstøðurnar hjá róðrarfólki, sum rógva fyri Kappróðrarfelagið NSÍ, eru betraðar við nýggjum venjingarhøli í Róðrarneystinum á Glyvrum.

– Her kunnu bæði róðrarfólk og onnur, sum vilja leiga hølini, venja.

Í Kappróðrarfelagnum siga tey, at venjingarútgerðin er nútímans, og úrvalið av maskinum er fjølbroytt.

– Harumframt er ein stórskíggi settur upp, soleiðis at tey íðkandi kunnu hyggja at ymiskum, meðan vant verður.

Formaður í Kappróðrarfelagnum hjá NSÍ er Sofus T. Hansen.

Blái Krossur Føroya:

# Gospel-konsert á Eystanstevnu

**Fjølbroytt og spennandi gospel-konsert verður í Ítróttarhøllini í Runavík í kvøld, fríggjakvøldið, har fleiri av okkara kendastu gospel-tónleikarum verða við. Sum nakað nýtt, fara eisini nakrir løgtingsmenn í Eysturoy at royna seg sum gospel-sangarar á konsertini**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Eystanstevnu skipar Blái Krossur Føroya fyri stórari og áhugaverdari gospel-konsert, sum verður í Ítróttarhøllini í Runavík í kvøld, fríggjakvøldið.

Tey luttakandi á konsertini verða Suð, Siloakórið, Magni Christiansen, Heini Lutzen, Eyðun Jacobsen's Band, Petur Hans Hansen og Tórhild Bjarkhamar.

Sum nakað øðrvísi – og helst rættiliga serføroyskt – fara nakrir løgtingsmenn í Eysturoy eisini at royna seg sum gospel-sangarar á konsertini.

– Ætlanin er, at konsertin skal verða so fjølbroytt og áhugaverd sum gjørligt, og tí fáa einstøku bólkarnir og solistarnir »bert« 15 minuttir í part. Konsertin byrjar klokkan 21 og endar ætlandi klokkan 23.30, tá ið uppboðssøla av málningum verður á skránni, sigur Blái Krossur Føroya, sum herfyri læt upp skrivstovur í nýggjum hølum á fyrstu hædd á Hotel Runavík Sjómansheiminum.

## Góður boðskapur

Jaspur Langgaard, sum er aðalskrivari hjá Bláa Krossi Føroya, sigur, at endamálið við tiltøkunum, sum hjálparfelagsskapurin skipar fyri, í fyrsta lagi er at fáa ein góðan boðskap út á ein positivan hátt – bæði við sangi, men eisini við eini andakt og stuttari kunning um hjálpararbeiðið hjá Bláa Krossi.

– Vit vóna eisini, at tiltakið fer at geva eitt íkast til raksturin av felagsskapinum, leggur hann aftrat.

Atgongumerkini kosta 120 krónur, og tey verða at fáa við dyrnar ein tíma fyri konsertina. Atgongumerki, sum verða keypt í forsølu, kosta 100 krónur. Børn undir 12 ár gjalda hálvan prís.

– Umframt at fáa andaliga »føði«, verður eisini høvi hjá fólki at seta seg niður við einum kaffimunni og onkrum góðum afturvið, sigur aðalskrivarin, Jaspur Langgaard.



*Starvsfólkini hjá Bláa Krossi Føroya á skrivstovuni hjá hjálparfelagsskapinum í Runavík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*